

# Hálshøgdi Hitler

Í Týsklandi hevur ein dómstólur gjørt av, at tann 41 ára ganli fyrrverandi løgreglumaðurin Frank Lachner skal gjalda bót, tí hann høgdi høvdið av einari voksmynd av Adolf Hitler. Tilburðurin var seinasta summar, tá ein umstrídd framsýning lat upp í Berlin. Frank Lascher var ímóti framsýningini, og tað eydnaðist honum at sleppa fram at einari standmynd av Hitler og at kappa høvdið av henni. BBC skrivar úr Berlin, at nú skal Frank Lascher rinda umleið 7.000 krónur í bót fyri gerðina. Í rættinum greiddi hann frá, at hann var í øðini um, at ein standmynd av Hitleri varð sett bara nakrar fáar hundrað metrar frá Holocaust-minnisvarðanum í Berlin.




*Nøkur føroysk skip hava roynt eftir lakssild, og millum hesi hevur Finnur Fríði havt fólk hjá Havstovuni og trolvirkinum Vónini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Spennandi verður, um lønandi veiða kann fáast burtur úr havssild*

*Mynd: Havstovan*

5, 40, 60, 5 og 3 tons.

Í tí triðja hálinum í ein landnyrðing úr Fugloynni var ov nógv hjáveiða av upsa, og tí varð gjørt av at leita víðari. Í hálinum, sum skipið hevði sunnanfyri Føroyabanka, fekk Finnur Fríði 5 tons av fleiri ymiskum sløgum av fiski, tó mest av svartkjafti. Í hálinum, sum skipið hevði á Reykjanesrygginum, vóru 3 tons, bert lakssild. Havstovan staðfesti eisini, at lakssildin, sum fekst í hesum háli, var nógv smærri enn í hinum hálunum á túrinum.

Av teimum fimm hálunum var at kalla eingin hjáveiða í fýra hálum.

Tá Finnur Fríði noyddist at rýma, tí tað eina hálið í ein landnyrðing úr Fugloynni hevði so nógva hjáveiði av upsa, vórðu magar í 20 upsum kannaðir. Tað vísti seg, at magnarnir í stóru upsunum vóru fullir av lakssild, meðan smærru upsarnir høvdu etið lakssild og hvítingsbróður.

## Niðurstøða

Í síni niðurstøðu um royndarveiðina eftir lakssild, sigur Havstovan, at lakssild kemur í trolið, um hon er til steðar.

Lagt verður aftrat, at hetta er ein fiskur, sum ikki kann rekast, men glúpast, sum tikið verður til í frágreiðingini.

Royndirnar hjá íslendingum eru, at lakssild verður ávirkað av veðri, har hon spjaðist í vánaligum líkindum og savnast ikki aftur fyrr enn ein dag eftir, at veðrið er batnað aftur.



*Gróðurtølini higartil í ár kunnu metast við tey bestu, og mangt bendir á, at okkurt er í væntu hjá skipum og bátum*

*Mynd: Karstin Vang*

# Høg gróðurtøl geva vónir um betri veiði

**Gróðurtølini fyri plantuæti, sum er grundarlagið undir øllum lívi í havinum, eru rættiliga góð higartil í ár – líka so góð, sum tey vóru undan góðu fiskiárunum, sum komu eftir aldarskiftið**

GRÓÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bæði í fjør og í ár hevur líka sum ligið í "kortunum", at niðurgongdin í fiskiskapi eftir eitt nú toski og kanska øðrum fiskasløgum við fer at venda til framgongd. Árið higartil í ár bendir á, at positiva gongdin á landgrunninum fer at halda fram.

Á heimasíðuni hjá Havstovuni eru grafar yvir gróðurtøl seinastu árini. Hesi tøl verða uppdaterað regluliga við tað, at støðir eru, sum áhaldandi máta plantuæti á landgrunninum.

Tølini fyri í ár benda á, at náttúran rættiliga er við okkum aftur. Høg gróðurtøl – ella tøl yvir plantuæti – merkja, at meira lív er í sjónum, og hetta merkir so aftur, at grundarlagið undir øðrum lívi verður skapt.

Plantuæti er grundarlagið undir ymiskum djóraæti, sum aftur er grundarlagið undir larvum, yngli og tí smáa fiskinum, sum kemur undan eftir gýting.

Í fjør varð eisini meira nebbasild staðfest í føroyskum sjógvi enn í nógv undanfarin ár, og nebbasildin er ikki minst føði hjá toski og fugli.

### Kurvan "brotnaði"

Í byrjanini av seinasta ári vóru gróðurtølini eisini góð, men tá ið summarið nærkaðist, "knekkaði" kurvan nakað, og gróðurin gjørdist minni. Tá kurvan brotnar, missir landgrunnurin nakað av tí framleiðslu í sjónum, sum annars var í gongd.

Tølini yvir árið í ár vísa, at gróðurin á landgrunninum higartil er munandi betri enn í fjør.

Hvussu gýtingin hevur vignast, er trupult at siga nakað um enn, men nærri greiða fæst á hesum, tá yngulkanningar verða gjørdar nakað eftir hálvan juni.

Tá fer Havstovan eisini at gera ætikanningar, og tá fæst líka sum eitt boð aftrat upp á, hvussu støðan á landgrunninum við æti og gýting í veruleikanum er.

Á Havstovuni siga tey, at um tey útlit halda, sum í løtuni eru fyri gróðuri á landgrunninum, verða gróðurtølini í ár líka so góð sum í ár 2000, sum aftur legði grundarlagið undir góðu fiskiveiðina árini eftir.